# Gott fótbóltsveður til landsdystin

Tá fraklendingar seinastu vitjaðu her fyri trimum árum síðani til landsdyst, var veðrið ikki teimum til vildar. Hesaferð verður kortini øðrvísi, tí veðrið verður nevniliga av tí besta. Ongum nýtist tí at setast aftur til dystin, orsakað av veðri. Morgindagurin byrjar við einum strúki av útsynningi og ælingi, men tá tað fer at nærkast dystarbyrjan klokkan 16 slítur hann í. - Óhugsandi er ikki, at onkrir sólarglottar verða undir dystinum á Tórsvølli í morgin, sigur veðurmaðurin Petur Skeel Jacobsen. Hitin verður millum 10 og 13 stig.



# Seyðauppboðsøla í Tinghúsgarðinum

Í morgin, leygardagin 13. oktober kl. 12:00, verður almenn seyðauppboðssøla í Tinghúsgarðinum í Havn millum Eik Banka og Tingúsið. Seld verða veðrar og veðurlomb úr Toftahaga í Hósvík, og uppboðshaldarar verða tíðindafróðu Sjúrður Skaale og Tórbjørn Jacobsen, sum á sín skemtiliga hátt fara at selja fýrbeintu hósvíkingarnar til hægstbjóðandi. Fyriskipari er Róðrarfelagið Knørrur í Havn, og innkomni peningurin fer allur til at reka virksemið hjá felagnum.

## Einki politiskt comeback frá Signari

**- Eg eri farin burtur úr politikki, og eg ælti mær ikki upp í aftur. Nú gangi eg upp í skúlastjórastarvið í Klaksvík við lív og sál, sigur Signar á Brúnni**

POLITIKKUR

Síðani í fjør hevur Signar á Brúnni úr Fuglafirði verið skúlastjóri í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík. Í fyrstu syftu var ætlanin, at Signar skuldi traðka til eitt styttri tíðarskeið, men nú er hann í føstum stjórastarvi í skúlanum.

- Eg fekk ein áheitan frá Mentamálaráðnum um at gerast skúlastjóri í Klaksvík, meðan søkt var eftir nýggjum stjóra, og eg tók av tí. Eg kendi meg sera vælkomnan í Klaksvík, og tá søkt varð eftir nýggjum stjóra, fekk eg fleiri áheitanir um at søkja starvið, og tað gjørdi eg, segði Signar á Brúnni við Rás 2 í gjár.

Hóast Signar á Brúnni er kendur sum politikari, hevur skúlin í enn størri mun verið partur av hansara yrkisleið.

- Skúlin hevur verið mítt lív. Eg hevði verið í bankalæru, men søkti so at verða vikarur í Gøtu skúla í 1963. Og eg kendi beinanvegin á mær, at hetta var tað rætta fyri meg. Eg tók síðani útbúgving sum lærari og havi virkað í skúlanum síðani, sigur Signar á Brúnni, ið áður hevur verið løgtingsog landsstýrismaður.

Hann ætlar sær ikki at gera comeback í politikki.

- Eg eri farin burtur úr politikki, og eg ælti mær ikki upp í aftur. Nú gangi eg upp í skúlastjórastarvið við lív og sál, og tað ætli eg mær framhaldandi at gera. Mær dámar væl at royna nakað nýtt innan skúlan, og tað geri eg í Klaksvík, og eg eri helst mettaður av politikki, sigur Signar á Brúnni.

# Rein Vestaravág

**Tórshavnar Býráð samtykti hóskvøldið eina stórfingna og kostnaðarmikla ætlan, sum skal føra til, at Vestaravág í framtíðini skal gerast rein fyri olju og skitnum spillvatni**

UMHVØRVI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Vestaravág skal gerast púra rein. Alt útlát, tað verið seg áir ella kloakkir, skulu hava reinsiverk á veg út á sjógv, og sum nakað spildurnýtt skulu allir smábátar í framtíðini hava eitt sonevnt kjølsvín liggjandi í kjølinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ein stórur partur av býráðsfundinum í Tórshavnar Kommunu í gjárkvøldið snúði seg um umhvørvið.

Sambært lóg er tað álagt kommununum at kloakera og reinsa alla útrenning á sjógv í seinasta lagi í 2010, og sum ein lið í hesi áleggjing samtykti býráðið, at gera kloakk frá Ellisheiminum til Bryggjaríið hjá Restorff. Hendan skal síðani bindast í verandi kloakk sum partur av reinsanini av Rættará, sum so aftur er leidd út á Vestaruvág.

Víst verður í tilmælinum á, at av tí at talan er um arbeiði í gomlum býarpørtum, kann verða trupult at fáa kostnaðarmetingina at halda, og tí verður mælt til, at vegog kloakkdeildin hjá kommununi skal gera arbeiðið.

Kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er mett til umleið eina millión krónur. Tá er tikið við í metingina, at neyðugt verður at leggja nýggjar gongubreytarkantar millum J. C. Svabosgøtu og Fróðskaparsetrið. Arbeiðið verður mett at taka tveir mánaðir.

Málið varð so endaliga samtykt uttan atkvøðugreiðslu á býráðsfundi í gjárkvøldið.

### Kjølsvín

Men eitt er tað, ið verður leitt út á sógv úr áum og kloakkum. Eitt annað er tað, ið stavar frá skipum og bátum, ið liggja á vágni.

Tað eru bert fáar vikur síðani, at umfatandi oljudálking var á Vestaruvág, sum mett var til fleiri túsund litrar. Stórt uppruddingar- og reinsiarbeiði stóðst av hesi dálking. Men nakað annað er, at havnirnar í kommununi hýsa áleið 600 smábátum, og hesir verða pumpaðir so at siga hvønn dag.

- Øll, sum hava við smábátar at gera, vita, at tað altíð liggur nakað av olju í kjølinum. Tað slepst ikki undan. Men hendan oljan fylgir við, tá bátarnir verða pumpaðir, og tilsamans gerst talan um kanska fleiri túsund litrar av olju, sum á henda hátt verða pumpaðir út á vágirnar um árið, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Men tað finst samstundis ein góð og bílig loysn, sum forðar fyri, at hendan oljan endar á sjónum, nevniliga hesi sonevndu kjølsvínini. Hetta eru absorberandi slangur, sum súgva oljuna í seg, so bert reint vatn og sjógvur verður pumpað úr bátunum.

- Her er talan um eina góða, men samstundis eisini eina bíliga loysn. Eitt slíkt kjølsvín kostar áleið ein hundrakrónuseðil, og so kann hann antin leggjast aftrat havnaleiguni, ella smábátaeigararnir sjálvir syrgja fyri, at eitt slíkt er í bátinum, sigur Heðin Mortensen.

Tórshavnar Kommuna er fyrsta kommunan í landinum, sum hevur sett slíkt umhvørviskrav til smábátaeigararnar.

# Tríggir harrar – tríggir guitarar

UMMÆLI

*konsert við Acoustica Trio & Stanley*

*Ragnar Olsen, guittarleikari*

Norðurlandahúsið varkarmur um eina sera væleygnaða konsert sunnudagin.

Nógv fólk var komið at lurta eftir hesum trimum harrunum við Stanley Samuelsen á odda.

Steen Vidar Larsen – Øistein Rian og Stanley Samuelsen í danna triona "Acoustica" løgdu karmar um eina sera viðkomandi konsert, við teirra innlivandi guitarspæli og vakra sangi var eingin ivi um, at talan er um eina professionella framførslu av norskum – føroyskum – og enskum løgum.

Teir tríggir harranar suppelera hvønannan sera væl. Stanley sang tey føroysku løgini vakurt og expressift. Stanley var eisini lead - solo – guitarist men hinir báðir fingu eisini høvi at vísa teirra Guirarkynstur.

Konsertin var víttfevnandi og við at skapa ein slíkan bólk av norðurlenskum tónleikarum gevur hetta ein sera áhugaverdan urdrátt av løgum og víttfevnandi reptuari. Sum indvilistar stóðu Normennir seg eisini sera val og serliga vakurt var at hoyra teir hava hvørsítt boð upp á sangir hjá The Eagels.

At hoyra hesar tíggjar menninar syngja trístemt harmoni kundi veruliga minna ein á tíðina, tá Crosby Stills & Nash og The Eagels vóru í hæddini. Vakurt og Poetiskt.

Ein heilstoypt konsert í serklassa.

